

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 02 - 2012

# Grønlendska NUNAOIL góðar vónir

Hóast einki er komið burtur úr oljuleitingini í Grønlandi enn, hevur tað almenna felagið NUNAOIL framvegis góðar vónir um, at olja verður funnin í grønlendskum sjóøki. Í einum tíðindaskrivi skrivar forstjórin í NUNAOIL, Hans Christian Olsen, at í fjør vórðu tekin um olju og gass funnin í undirgrundini. Samstundis varð nógv lagt afturat tí jarðfrøðiliga kunnleikanum, og tað hevði við sær, at NUNAOIL annað árið á rað hevði avlop á roknskapinum fyri árið í fjør av at selja kanningarúrslit. Avlopið í fjør var 1,2 millión krónur. Tað var eitt munandi betri úrslit, enn leiðslan hevði væntað, tí sambært stjóranum hevur felagið roknað við halli, til olja verður funnin í so mikið stórum nøgdum, at tað lønar seg at útvinna hana. Hans Christian Olsen sigur, at eftir hansara tykki er tað sera sannlíkt, at olja er í grønlendsku undirgrundini og so mikið, at tað fer at løna seg at útvinna hana. Harafturat heldur hann tað vera týdningarmikið, at feløgini støðugt fáa fleiri og betri upplýsingar at arbeiða út frá. -Tað økir um møguleikarnar fyri, at onkur rakar rætt, sigur stjórin í NUNAOIL. Almenna grønlendska oljufelagið eigur í 20 virknum leitiloyvum, sum umfata 210.000 ferkilometrar við Vesturgrønland. Partapeningurin er í felagnum er 10 milliónir krónur, og eginpeningurin er nú 56 milliónir krónur.